Tórshavn, hin 23. juni 2010
Málnr.: 201000402

**HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN**

Útgáva 2
**Matvørudeildin**

# Vegleiðing
## Smásøla uttan virking og pakking

**Endamál**
Søla av pakkaðum og merktum matvørum.

**Hølir**
- Vørumóttøka.
- Goymsla til turrvørur.
- Køli- og frystiskipanir.
- Útsølurúm/-øki
- Skiftirúm og vesi til starvsfólk.
- Matstað til starvsfólk
- Rúm ella bingja til burturkast.
- Stað til returvørur.
- Rúm til reingerðaramboð og reingerðarevni við skolivaski.

**Innrætting**
Støddin á hølunum skal svara til vøruútboðið (slag og nøgd), og hølini skulu plaserast hóskandi hvørt í mun til annað.

**Vegleiðing til innrætting:**
- Vørumóttøka við plássi til útpakking og goymslu av returtilfari.
- Goymslurúm til turrvørur.
- Neyðugar køli- og frystiskipanir. Hesar kunnu vera á goymsluni ella í útsølurúminum, um talan er um sjálvtøkuhandil.
- Útsølurúm, um talan er um sjálvtøkuhandil. Útsøluøki, atskilt frá viðskiftafólki við diski, um talan er um útflýggjan av vørum.
- Vesi, við forrúmi. Hondvask skal vera á vesinum ella í forrúminum.
- Skiftirúm ella stað til starvsfólk. Skiftirúm kann vera í forrúminum til vesi.
- Matstað til starvsfólk. Um starvsfólkunum er loyvt at roykja, skal hetta vera í rúmi fyri seg.
- Eitt ávíst stað skal vera til returvørur, so hesar ikki koma í samband við reinar vørur.
- Eitt rúm ella hóskandi stað, atskilt frá matvørum, til reingerðaramboð og reingerðarevni. Eitt skolivask til spillvatn frá reingerðini.

**Útbúnaður**
- Flótandi sápa, einnýtishandklæði og ruskspann við øll hondvøsk.
- Ongar vørur skulu standa á gólvinum. Hesar skulu allar vera á hillum, plattum e.l.
- Allur leysur útbúnaður, amboð o.a. skal hanga ella standa upp frá gólvinum á hóskandi hillum e.l., eisini reingerðaramboð.

**Tilfar**
- Veggir, gólv, loft, hurðar og vindeygakarmar skulu vera úr hørðum, sløttum tilfari, sum er lætt at halda reint.
- Allur útbúnaður skal vera úr hørðum, sløttum tilfari, sum er lætt at halda reint.

**Burturkastskipan**
- Burturkast skal beinast út úr hølunum minst eina fer dagliga og beinast burtur á ein fullgóðan hátt, samsvarandi kommunalu skipanini (KOB/IRF).
- Afturlatið rúm/bingja skal vera til burturkastið.
- Ruskrúm ella bingjustað skal kunna spulast/vaskast.

**Reingerð**
- Allur útbúnaður og amboð skulu gerast rein minst eina ferð hvønn arbeiðsdag.

**Perónligt reinføri**
- Arbeiðsfólk skal bera hóskandi arbeiðsbúnað, sum skal vera reinur.

**Annað**
- Arbeiðast skal soleiðis, at trygd verður veitt fyri, at liðugvøran ikki verður dálkað av rávøruni ella nærumhvørvinum.
- Royking er bannað á øllum støðum, har matur verður viðgjørdur ella goymdur.

Mint verður á, at hetta eru vegleiðandi krøv til innrætting.
Mett verður um hølisviðurskiftini og endalig avgerð verður tikin í hvørjum einstøkum føri.